Grønlandstíðindi Kári við Stein



*Væl ber Ocean Prawns lastina 820 tons*




Grønlandstídindi:

# Kuldi og canadisk rokveiða eftir rækjum

**Kári við Stein fylgir væl við gongdini við fiskiskapinum í Grønlandi. Her eru hansara seinastu tíðindi**

### 15. februar
Í dag er dýrdarveður og – 6 stig. Frætt er frá Atlantic Enterprice, har William Hansen av Toftum er skipari. Teir eru á veg til Pamiut at landa 750 tons av rækjum, sum teir hava fiskað í 13 samdøgur. Reiðaríið hjá teimum hevur gjørt eina avtalu við Royal Greenland um at landa 3.000 tons av rækjum til virkið í Pamiut. Hetta er so fyrsta lastin, sum teir koma við. Teir verða inni í morgin til arbeiðstíð.

### 16. februar
Í dag er stilli og – 8-10 stig. Qaqqatsiaq er komin til Nuuk at landa og at umvæla okkurt brekið. Teir rokna við at verða leysir leygardagin.

### 18. februar
Í dag er lot av norði, um 15 kuldastig. Akamalik kom inn til Nuuk at landa í morgun vid fullum skipið. Teir hava verið syðri á, har eru bátarnir nú. Natarnaq er farin at sigla til Eysturgrønlands, har søgur siga frá brúkiligum fiskiskapi hjá fleiri av trolarunum.
Polar Aassik var inni í Aasiat og landadi hósdagin um 60 tons.

### 21. februar
Nú er vetur her hjá okkum sum í gomlum døgum, – 23 stig. Eg síggi ísin norðanfyri her. Men tað er ein glotti av opnum sjógvi sunnan fyri, ein øgilig ístoka er at síggja til.
Polar Natarnaq og Lómur liggja her sunnan fyri og royna. Steffan C og Polar Qaasiuq eru í Dýpinum. Hann hevur lovað kulda eina tíð við vindi av norði.
Uppi í Thule vóru máld í gjár – 30 stig. Her skal hann bara koma lágt við vindi, so ísurin fer í sor, so at trolararnir kunna koma aftur her at royna. Frætt er, at Markus kom til Akureyri í dag, og at Artic Viking liggur á Hafnafjørðinum við onkrum breki. Samtidis skulla teir landa tað, sum teir hava inni. Polar Aassik konklaði seg út aftur í morgun. Teir vóru uttan fyri Kullen og skuldu til at skjóta trolið nú, eg tosaði við teir. Har var havið hvítt rundan um teir.

### 23. februar
Í dag er – 12 stig og stilli. Ein gamal kenningur kom inn at landa í morgun. Tað er fyrrverandi bornholmarin Ocean Prawns, sum nú er canadiskur. Teir hava fult skip, ja alt sum fyllast kann av rækjum, heili 820 tons av sekkjarækjum, sum skuldu landast í Pamiut. Av tí, at Atlantic Enterprice júst hevur veri í Pamiut við um 750 tonsum, var ikki pláss har suðuri, so hann kom higar í staðin. Henda túrin byrjaðu teir mikudagin 7. februar, og teir fiskaðu uppí lastina í 11 samdøgur. Óført fiskarí, tað kann ikki sigast annað. Hetta er so størsta rækjulast, sum er løgd upp av einum skipi í Sisimiut.
Markus er komin til Akureyri. Teir skulla í dokk har. Teir royndu í Eysturgrønlandi á veg til Íslands. Sum skilst fingu teir fitt av rækjum.

### 24. februar
Í dag – 10 stig og stilli. Manu er komin inn til Manitsoq at landa svartkalva. Síðani skulu teir á skipasmiðju í Íslandi, har ymiskar umvælingar skulla gerast. Teir skulla gera okkurt vid toskalinjuna umborð.

### 25. februar
Polar Nanoq kom til Nuuk í morgun at landa rækjur. Síðani fara teir á svartkalva í Eysturgrønlandi

### 26. februar
Í dag eru – 12 stig og stilli. Lómur kom inn at landa í dag. Teir hava um 50 tons inni. Tað hevur viðrað illa hjá bátunum her út fyri. Eg síggi onkuntíð onkrar bátar í innara kanti av Holsteinsborgdýpinum. Har eru so nógvir av teimum smærru bátunum. Tað er sum at síggja russarnar fyrr í tíðini eystan fyri Nólsoynna.

### 1. mars
Í dag er lot av suðri og – 14 stig. Polar Aassik kom inn til Nuuk at landa í morgun. Teir rokna við at sigla í seinnapartin til nýggjan túr. Allur ísur út fyri her er knústur, so nú er siglandi hjá jollunum eisini. Lomvigajaktin var liðug í gjár, so nú má bíðast líka til 16. oktobur aftur fyri at fága svartfugl í grýtuna. Polar Nagtoralik er komin til Eysturgrønlands. Ocean Tiger fór at sigla til Hafnafjørðin í gjárkvøldi við knappari fullari last. Slagið er brúkiligt verður sagt. Sagt verður eisini, at Natarnaq hevur gjørt tad gott eystanfyri. Sagt verður eisini, at Manu liggur suðuri við Narsaq og krokar. Teir eru sum sagt á veg til Íslands, men veðrið er ikki til vildar vid yvirísing.